

*Oddmar Hentze og hansara menn hava longu sett síni fríðkanar-merki á bygdina – her við sparkivøllirnar í bygdini*
*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

# Fríðka og planta í bygdini

**- Slíkt verður ikki gjørt frá einum degi til annan, sigur Oddmar Hentze, umsjónarmaður í Skopun**

Fríðka
*Snorri Brend*

**Skopun:** Tað er ymiskt frá bygd til bygd, hvussu stórur dentur verður lagdur á at halda bygdina viðlíka – og eisini at fríðka um hana.

Í Skopun hevur hetta arbeiðið kanska ligið á láni eitt skifti, men í dag síggjast týðilig tekin um, at her er vend komin í.

Ein ætlan er gjørd um, hvussu hetta skal fremjast í verki. Og týsdagin í farnu viku vóru menn til arbeiðis við nýggja sparkivøllin ovarlaga í bygdini.

- Tá slík arbeiðir hava ligið á láni, er altíð nógv at gera, tá ein so fer í gongd.

- Men nú er so ein byrjan komin á, sigur Oddmar Hentze, umsjónarmaður í Skopunar kommunu.

Her við sparkivøllin eru teir í løtuni í ferð við at gera kantarnar. Her skal haraftrat gerast ein gongubreyt, eins og ein ætlar planta ein hóp av trøum.

### Nógv eftir

Hóast skiftandi tíðir og ójøvn ár til búskap, so er líkt til at ein í kommununi hevur fingið nýtt eyga fyri týdninginum av at fríðka um í bygdini.

Gjøgnum árini eru so líðandi gjørd fleiri arbeiðir, sum veruliga hava fríðkað um. Hetta sær ein bara og best við at ganga runt um í bygdini.

Hóast nógv er gjørt, so er kortini nógv eftir. Men einki er sum bendir á, at ein ætlar at steðga við hesum fyri tað.

Teir hava m.a. sett upp fleiri benkur og hava haraftrat sett niður trø ymsastaðni í bygdini.

- Og nú hava vit so eisini fingið ein sparkivøll heruppi, greiðir Oddmar frá.

Í roynd og veru eru tveir slíkir vøllir í hesum økinum – ein heldur størri og ein minni.

### Heldur á

Millum tey økini sum kommunan hevur valt at fríðka er økið beint við kirkjuna. Men arbeiðið steðgar ikki upp við hesum.

Tað eru eini trý øki aftrat, sum teir skjótt ætla sær undir skjótt. Eitt teirra er við minnisvarðan í bygdini.

Eisini rundan um skúlan hava teir gjørt eitt arbeiði.

- Tað er tað sum er beint nú. Men tað er heldur ikki so lítið, sum Oddmar tekur til.

## Nýggjan barnagarð í november

**Skopun:** Einaferð í framtíðini verður koyrandi av Sandoynni og inn á meginøkið. Til hetta er neyðugt at bygdirnar í oynni tilbúgva seg til hesa stórhendingina.

Í Skopun eru tey komin væl ávegis til at menna bygdina til tær avbjóðingarnar sum standa fyri framman.

Har verður m.a. stykkjað út, eins og ætlanir eru um at útbyggja skúlan, sum er vorðin ov lítil. Tekning er í høvuðsheitum gjørd til ætlaðu útbyggingina. Enn er kortini ikki nøkur tíðarætlan sett á, nær henda útbyggingin verður liðug.

Eitt annað arbeiði er eisini komið væl áleiðis, og tað er nýggi barnagarðurin. Hann verður eftir ætlan tikin í nýtslu um eina góðan mánað.

- Har verður pláss fyri eini 60 børnum, upplýsir borgarstjórin, Gerhard Lognberg.

**sb.**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Keypssamtøkan í Dr. Jakobsensgøtu

FK í Dr. Jakobsensgøtu sóknast eftir

**Varaleiðara**

at byrja skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu

**Vit kunnu bjóða tær**
- eitt spennandi starv, har tú fært høvi at vísa tíni evnir og hugflog
- ein handil við góðum rakstri og spennandi, lívligum umhvørvi
- Løn eftir avtalu og m.a. førleika

**Vit vænta av tær**
- at tú kanst hava ábyrgd av, at handilin altíð er til reiðar at taka móti kundum
- kanst skipa fyri góðari kundarøkt
- at tær dámar at taka av avbjóðingum og hava nógv at gera
- at tú ert sjálvstøðug/ur, ábyrgdarfull/ur og kanst skifta millum arbeiðsuppgávurnar í handlinum
- at tú hevur kunnleika til handilsyrkið

Meira fæst at vita um starvið við at støkka inn á gólvið ella ringja á tel 312320 el. 217593 og spyrja eftir leiðaranum Bo Møller

Umsókn skal vera okkum í hendi innan 19. oktober, ella skjótast gjørligt

**Keypssamtøkan**
í Dr. Jakobsensgøtu
Postsmoga 349
FO-110 Tórshavn
Tel 31 13 20

Att.: Bo Møller
Fartel 217593
bm@fk.fo